


Leif Johan Sevland, fyrrverandi borgarstjóri í Stavanger og nú stjóri fyri ONS oljumessuni vitjar føroyska básin í Aberdeen, her saman vi kvinnunum á básinum, Esther Dahl, Maluni Ellfsen og Jórun Gardar. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Føroyar eiga eitt týðandi pláss í Stavanger

**Jan Müller**

10.09.2015 - 14:32

Oljan.fo

Hóast tað er eitt ár til næstu stóru oljumessuna, ONS í Stavanger, so sær stjórin fyri ONS, fyrrverandi borgarstjórin í Stavanger, Leif Johan Sevland fram til, at Føroyar aftur verða partur av hesi eini av heimsins størstu oljumessum.

“Vit hava altíð havt góð viðurskifti og samstarv við føroyingar, tað veri seg vinnufyritøkur og myndugleikar, og vit síggja fram til, at føroyingar verða við til oljumessuna komandi ár umframt at vera partur av tiltakinum á bryggjuni við slupp og manning og føroyskum tónleiki. Føroyar og føroyingar eiga eitt týðandi pláss hjá okkum norðmonnum”, sigur Leif Johan, tá hann vitjar føroyska básin í Aberdeen. Her hevur hann høvi at hitta umboð fyri føroyskar fyritøkur og ikki minst tey, sum fara at skipa fyri føroysku luttøkuni í Stavanger

næsta ár. Hóast vánirnar ikki eru góðar í vinnuni í løtuni, so er longu nærum fullteknað til ONS 2016.

Jórun Gardar, samskipari í Vinnuhúsinum og skrivari í Oljuvinnufelagnum, sigur við oljan.fo, at tey longu hava bílagt pláss á ONS og sær hon fegin, at uppaftur fleiri føroyskar fyritøkur verða við tá. Hon fegnast annars um luttøkuna og heldur tað vera gott fyri Føroyar, at vit hava egnan bás á messuni. Lesið eisini samrøðu við Jórun seinni.



